# 23 á muni

*Kvinnurnar hjá VÍF gjørdu ikki sama mistak sum menninir, men gjørdu ístaðin bart, tá Tjaldur var á vitjan*

JÁKUP MØRK

VÍF-Tjaldur 32-9 (17-6)

Ofta verður tikið til, at um sama mistak verður gjørt fleiri ferð á rað, er okkurt logandi galið. Hetta tóktust vestmannakvinnurnar eisini at hava fatað, og tískil fóru tær í fullum álvara undir uppgávuna, tá kvinnurnar hjá Tjaldur skuldu royna seg móti kvinnunum hjá VÍF.

### Einvegis ferðsla

Tað var nevnliga rættuliga skjótt greitt, at VÍF ætlaði sær at vinna henda dystin, tí beinanvegin byrjaðu tær at skræða seg leysar á máltalvuni.

Tjaldurskvinnurnar formáddu sær millum lítið og einki móti væl skipaðu vestmanna(kvinnu)verjuni, og tá vestmannakvinnurnar fingu væl burtur úr í hinum endanum, gjørdist úrslitið eisini har eftir.

Tað er tó merkisvert, at munurin á máltalvuni skuldi gerast somikið stórur. Aloftast er tað jú soleiðis, at tá annað liðið hevur eina stóra leiðslu, verður slakað móti endanum, soleiðis at hitt liðið fær pyntað eitt sindur um úrslitið.

Hetta hendi tó ongantíð í vestmanna sunnudagin, og tað má sigast vestmannakvinnunum til rós, at tær alla tíðina royndu at halda leikferðini uppi.

### Til Klaksvíkar

Hóast tað var væntað framman undan, at VÍF skuldi vinna ein tryggan sigur, so er tað helst styrkjandi fyri sjálvsálitið, at verjuparturin riggaði somikið væl sunnudagin.

Júst verjuparturin verður helst av alstórum týdningi, tá VÍF komandi hósdag skal til Klaksvíkar, har tær í grundspælinum vóru einasta liðið, sum fekk nakað við sær heim aftur. Tó er í løtuni óvist, um hesin dystur verður til nakað, tí VÍF kvinnurnar vilja helst sleppa at flyta dystin enn eina ferð. Frammanundan er dysturin fluttur, orsakað av steypakappingini.

Undir øllum umstøðum skal dysturin leikast, og helst verður hetta ein av teimum dystum, sum fara at hava stóran týdning fyri, um tað meistaraheitið endar í Klaksvík, ella um VÍF, Neistin ella Kyndil veruliga megna at gera álvara av hóttanini móti annars suverenu Klaksvíksgentunum.

**Dysturin í tølum:**
Málskjúttar:
VÍF: Ioana Rápa 12 (6), Jacklin Durhuus 7 (1), Nicolina Joensen 6, Signhild Petersen 3 (1), Fríða Johannesen 2, Angelie Jógvansdóttir 1, Randi Kúrberg 1
Tjaldur: Sonja Gleðisheygg 5, Sunrid Gleðisheygg 2 (2), Mona Langgaard 1 (1), Oddvá Fossdalsá 1
Brotskøst:
VÍF 8, Tjaldur 4
Útvísingar:
VÍF 3, Tjaldur 6
Dómarar úr Neistanum:
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



*Eingin ivi var um úrslitið, tá kvinnurnar hjá VÍF og Tjaldur møttust sunnudagin*



*Tað var nær við, at vestmenningar snávaðu sunnudagin, men at enda komu stigini til høldar, soleiðis at teir framhaldandi eru á odda í landskappingini hjá monnum*

**Savnsmynd**

# VÍF mundi koppað

*Sensatiónin lúrdi, tá Tjaldur sunnudagin vitjaði í Vestmanna, men eftir ein sera javnan og spennandi dyst, gjørdist tað kortini VÍF, sumdróg longra stráðið*

JÁKUP MØRK

VÍF-Tjaldur 23-22 (11-11)

Verður hugt at stigatalvuni, átti eingin ivi at verið um úrslitið, tá VÍF og Tjaldur hittust í Vestmanna sunnudagin.

Vestmenningar eru í løtuni á odda í landskappingini hjá monnum, meðan Tjaldur einans er nøkur mál framman fyri kollfirðingar, sum liggja á niðasta plássinum.

Kanska var tað eisini júst hetta, sum leikararnir hjá VÍF hugsaðu, tá teir trinu inn á vøllin til ein dyst, sum mest av øllum líktist einum avgreiðsluspurningi.

### Fingu annað at síggja

Leikararnir fingu tó annað at síggja, tá dysturin byrjaði, tí tjaldursmenninir høvdu als ongan hug at leggja seg flatar fyri oddaliðnum, men royndu tvørturímóti at berjast fyri møguleikanum.

Hetta sá eisini út til at eydnast, tí allan fyrra hálvleik gekk javnt á, og tá farið varð til hálvleiks, stóð á jøvnum millum liðini.

VÍF var undan dystinum skert nakað, tí Ingi Olsen hevði leikbann, og sostatt ikki var tøkur til dystin. Í hansara stað leikti Daniel Rápá, sum seinastu umførini rættuliga er komin fyri seg eftir drúgva skaðan, hann hevur havt í knænum.

Heilt komin fyri seg mundi hann tó ikki vera, tí eftir fáar minuttir á vøllinum var aftur galið við knænum, og óhepni rumenin noyðist helst enn einaferð at finna seg í at verða handan síðulinjuna, meðan liðfelagarnir stríðast fyri heiðursmerkjunum.

### Tjaldur helt fast

Í seinna hálvleiki var kanska væntandi, at orkan hjá runavíkingunum fór at ganga undan, og at VÍF tískil skuldi vinna ein tryggan sigur, men hetta hendi ongantíð.

Vestemenningar megnaðu ongantíð rættuliga at slíta seg leysar, og hóast teir vóru á odda við trimum málum, tá tað restaðu 10 minuttir, so megnaði Tjaldur enn eina ferð at koma aftur í aftur, soleiðis at tað stóð á jøvnum, tá ein minuttur var eftir at leika.

Vestemenningar fóru tá enn einaferð í álop, og hesu ferð góvu teir sær góðar stundir. Álopið endaði við, at VÍF fekk brotskast, og hesum syrgdi strórskjúttin, Sámal Joensen, fyri, soleiðis at væntaði sigurin at enda kom í hús.

### Ikki nóg uppsettir

Venjarin hjá vestmenningum, Hjalmar Klein Olsen, segði eftir dystin við Sosialin, at trupulleikin hjá teimum helst var, at menninir ikki vóru nóg uppsettir til dystin.

Tá so Daniel eisini varð skaddur rættuliga tíðliga gjørdist uppgávan uppaftur tyngri, og tískil gjørdist dysturin at enda óneyðuga spennandi. Tó leggur Hjalmar afturat, at við hesum skal einki takast frá runavíkingum, tí teir spældu so sanniliga fyri sínum møguleika.

-Tað týdningarmesta er tó, at dysturin varð vunnin, og hetta eydnaðist so, hóast tað at enda stóð nógv á, sigur Hjalmar, sum tó kortini leggur afturat, at hann ongantíð var bangin fyri at sigurin skuldi gleppa teimum av hondum. Hetta sýnir tó eisini, at hugburðurin til uppgávuna hevur veirð alt annað enn optimalur, og hetta viðgongur Hjalmar eisini.

Tað hevur víst seg nakrar ferðir í ár, at oddaliðini kunnu koma fáa trupulleikar, tá leikarar ikki fara heilhjartaðir á vøllin, men kortini hava bæði Neistin og StÍF, umframt VÍF sýnt, at tey eisini megna at fáa stigini, tá alt ikki gongur eftir vild, og vanliga verður eisini sagt, at hepnið fylgir einum oddaliði.

Eitt hepni, sum fjórða oddaliðið, Kyndil, ikki hevur havt við sær í ár, og kanska er hetta eisini orsøkin til, at teir á stigatalvuni eru nakað aftan fyri tey trý áðurnevndu.

### Iðra seg

Hjá tjaldursmonnum hevði Tummas Magnussen hevði ein rættuliga góðan dag sunnudagin, og tískil gjørdi tað ikki so nógv, at VÍF royndi at ansa væl eftir Sverra Justinussen, sum vanliga er mest vandamikli maðurin hjá Tjaldrinum.

Hendan verjan vísti seg tó ikki at vera nóg mikið, tí hóast Sverri einans fekk tvey mál, so var hann við í nógvum av tí, sum fyrifórst á vøllinu, og tískil valdi VÍF at mansverja hann seinasta partin av dystinum.

Tjaldursmenn munnu tó iðra seg um, at tað ikki eydnaðist teimum at fáa stigini sunnudagin, tí tað er lítið at taka seg aftur í, at risin var hoyknaður í knøunum, áðrenn seinasta málið varð skotið.

Umframt tað hepnið og sjálvsálit, sum fylgir einum oddaliði, so var málverjin hjá vestmenningum eisini ein stór orsøk til, at sensatiónin ikki varð fullgjørd.

Ein av fáu lutunum, sum hepnaðist hjá vestmenningum sunnudagin, var nevnliga at fáa fatur á brotskøstum, og fýra ferð vann Bárður Nielsen í VÍF málinum á mótstøðumonnum, tá hesir skuldu royna seg frá 7 metra strikuni.

Fóru nakrar av hesum royndum í málið, hevði søgan kanska verið ein onnur, men so var ikki, og runavíkingar kunnu tískil bert iðra seg um, at teir ikki megnaðu gera arbeiðið liðugt, tá teir nú høvdu møguleikan.

**Dysturin í tølum:**
**Málskjúttar:**
VÍF: Sámal Joensen 13 (3), Agnar Joensen 4, Ragnar Zachariasen 2, Petur Fr. Joensen 2, Harald Bjørgvin 1, Martin Hummeland 1
Tjaldur: Tummas Magnussen 8, Suni F. Johannesen 5, Ragnar Olsen 2, Sverri Justinussen 2, Arnfinn Langgaard 2, Mortan Hansen 2, Elias Hansen 1
**Brotskøst:**
VÍF 3, Tjaldur 5
**Útvísingar:**
VÍF 2, Tjaldur 4
**Dómarar úr Neistanum:**
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



# Neistakvinnurnar fingið ferð á

*Besta kvinnuliðið hjá Neistanum hevur enn ikki roynt at tapa síðani ársskifti, og nú eru tær av álvara farnar at tevja heiðursmerki*



*Rúna Wardum varð mest nýtt í verjupartinum sunnudagin, men her hevur hon so dittað sær fram til eina skotroynd*

**Mynd: Áki Bertholdsen**

JÁKUP MØRK

VB-Neistin 19-25 (10-11)

Útlit vóru fyri einum spennandi dysti suðuri í Vági sunnudagin, tá bestu kvinnuliðini hjá VB og Neistanum hittust.

Seinasta vikuskifti vóru somu lið í eldinum, tá fyrra hálvfinalan í steypakappingini stóð á skránni, og tað ferðina var bert tað eina máli á muni.

Dysturin hesu ferðina gjørdist eisini rættuliga spennandi, hóast endaligu tølini boða frá einum greiðum sigri til neistaliðið.

### Vunnu við fýra móti seks

Leingi gekk nevnliga sera javnt á millum liðini bæði, og hóast havnargenturnar høvdu munin meginpartin av fyrra hálvleiki, so megnaðu tær ongantíð at slíta seg rættuliga leysat frá heimaliðnum.

VB royndi seg meginpartin av fyrra hálvleiki við eini offensivari 5-1 verju, og av og á minti hetta um eina hálva mansverjing av Ileanu Manolescu, sum eisini bert fekk tvey mál hendan hálvleikin.

Í seinna hálvleiki leikaði eisini javnt á, men brádliga tók dysturin eina heldur merkisverda vend. Tvær av neistaleikarunum vóru brádliga útvístar, og væntandi var helst, at VB hesa løtuna kund toga seg eitt sindur fram um Neistan. Tað sum hendi var tó, at Neistin megnaði at skjóta tvey mál á rað, soleiðis at tær vóru á odda við tveimum málum, tá tær aftur vóru fullmannaðar, og eftir hetta tóktist allur iva at vera skúgvaður til viks.

Brádliga riggaði alt sum tað skuldi hjá neistaliðnum, og tá Hildur í hinum endanum tók meginpartin av tí, sum varð tvett eftir henni, kundu havnarkvinnnurnar at enda fegnast um trivaliga sigurin.

### Liðavrik og Hildur

Inga Danberg, liðskipari á neistaliðnum, sigur við Sosialin, at tað er einki at taka seg aftur í, at sigurin sunnudagin var eitt satt liðavrik.

-Allar stríddust veruliga fyri hvørja aðra, soleiðis at øll ábyrgdin ikki hekk á einstøkum leikarum, sigur Inga. Tó legði hon afturat, at Hildur stóð ikki minni enn ein branddyst í málinum.

Júst málverjarnir hava annars havt sera nógv at siga fyri neistaliðið, við tað at tað altíð ber til at skifta ímillum hesar, tá talan er um somikið frægar málverjar sum Hildur og Helenu. Hetta man landsliðsvenjarin helst hava lagt til merkis, tí Sophus hevur nevnliga úttikið báðar tvær til bruttohópin hjá kvinnulandsliðnum.

Hagtølini siga eisini, at VB misnýtti fýra av sjey brotskøstum í hesum dysti, og ikki er torført at ímynda sær, at endaliga støðan kundi verið nakað øðrvísi, um øll hesi vóru endað í netmeskunum.

### Hvør sítt

Spurd um sigurin kanska eisini hevur givið neistakvinnunum betri mót, nú seinna hálvfinalan móti VB stundar til, sigur hon, at dysturin sunnudagin als ikki kann sammetast við tann, sum verður komandi vikuskifti.

Lítið er tó at taka seg aftur í, at neistaliðið nú man hava eitt sálarligt yvirtak mótvegis vágsgentunum, tí seinastu tríggir dystirnir millum liðini bæði eru nevnliga allir endaðir við sigri til havnargenturnar.

VB genturnar munnu tó fara at geva alt tær orka, tá liðini bæði hittast komandi vikuskifti. Við ósigrinum sunnudagin eru tær so at siga afturúrsigldar í landskappingini, og tískil hava tær bert steypakappingina at hugsa um nú.

Dystirnir higartil í landskappingini hava eisini víst, at VB kvinnurnar kunnu gera um seg, tá tær spæla móti oddaliðnum, men higartil hevur teimum væntað tað allar seinasta til tess at gera av við mótstøðuliðini.

Í teimum báðum dystunum, sum liðið higartil hevur tapt í endaspælinum, kundu tær við eitt lítið sindur av hepni eins væl fingið bæði stigini, so munurin er hóast alt ikki størri enn so.

**Dysturin í tølum:**
**Málskúttar:**
VB: Regina Rádó 7 (2), Rannvá Augustinussen 4, Gurið Mortensen 4, Arnleyð Krosslá 2, Sólrun Krosslá 2 (1)
Neistin: Katrin á Neystabø 8 (4), Ileana Manolescu 6, Inga Danberg 3, Birita Wardum 3, Mildrid Jacobsen 2, Gunnleyg Berg 2, Marjun Jógvansdóttir 1
**Brotskøst:**
VB 7, Neistin 4
**Útvísingar:**
VB 3, Neistin 5
**Dómarar úr Tjaldur:**
Dánial Hansen og Kári Hansen

# Strandingar greiddu sína skyldu

*Uttan stórvegis hóvastak tryggjaðu strandingar sær tvey stig sunnudagin, tá teir á heimavølli leiktu móti kollfirðingum, sum ongantíð fingu høvi at koma rættuliga við í dystinum*

JÁKUP MØRK

StÍF-KÍF 32-22 (14-10)

Føroyameistararnir av Strondum vóru sunnudagin vertir, tá botnliðið úr Kollafirði kom á vitjan. Einki er at siga til, at strandingar undan dystidum vóru mettir at vera greiðir favorittar, og sum so livdu teir eisini upp til hetta heitið.

### Lág leikferð

Í byrjanini av dystinum gekk javnt á, og meginpartin av fyrra hálvleiki fylgdust liðini bæði hampuliga væl.

Seinasta triðingin av hálvleikinum tóku strandingar tó dik á seg, og kundu teir sostatt fara til hálvleiks við einari hampuligari leiðslu.

Í seinna hálvleiki skundaði heimaliðið sær at veksa enn meira um leiðsluna, og hóast kollfirðingar eftir hetta so dánt megnaðu at fylgja heimaliðnum, so kom sigurin ongantíð í vanda.

Av Skála frætta vit annars, at leikliga var dysturin ongantíð tað stóra upplivilsi. StÍF koyrdi sigurin heim uttan stórvegis hóvasták, og uttan nakrantíð veruliga at seta ferð á spæli.

### Hvør sítt at hugsa um

At úrslitið varð sum varð, man ikki koma óvart á nakran, tí sum gongdin hevur verið higartil í hesum kappingarárinum, so hava veikaru liðini ongantíð megnað at gjørt rættuliga fortreð, tá tey hava tikist við oddaliðini.

Gaman í hevur onkuntíð staðið nógv á hjá oddaliðunum, tá tey ikki hava tikið uppgávuna í nóg stórum álvara, men hinvegin eru neyðugu stigini kortini komin til høldar hvørja ferð.

StÍF er sostatt framhaldandi á triðja plássi í landskappingini, nøkur mál aftan fyri Neistan, og hóast munurin upp til vestmenningarnar er fýra stig, so hevur oddaliðið leikt ein dyst meira. Harumframt eru júst vestmenningar komandi mótstøðuliðið hja strandingum, so enn er einki avgjørt í oddastríðnum.

Kollfirðingar hava tó eisini sítt at hugsa um, tí enn eru teir ikki afturúrsigldir í bontstríðnum, so langt í frá. Komandi dysturin hjá teimum er móti Neistanum, har útlitini fyri stigum ikki munnu vera av teimum bestu, men eftir hetta standa bæði H71 og Tjaldur fyri tørni, og er tað helst í hesum dystunum, at neyðugu stigini skulu fáast til høldar.

**Dysturin í tølum:**
**Málskjúttar:**
StÍF: John Petersen 12 (6), Artur Johansen 7. Jónleif Sólsker 3, Sveinbjørn Poulsen 3, Bent Djurhuus 2, Alexandur Johansen 2, Marius Joensen 2, Kristian Peturson 1
KÍF: Vagnur Johansen 10, Jákup Dam 6, Petur Martin Poulsen 3, Finn H. Johannesen 1, Jónálvur Johannesen 1, Emil Petersen 1
**Brotskøst:**
StÍF 6, KÍF 1
**Útvísingar:**
StÍF 2, KÍF 7
**Diskvalifikatión:**
KÍF 1 (3x2 minuttir)
**Dómarar úr VÍF:**
Ingi Olsen og Alfred Hummeland



*Jónleif Sólsker var aftur at síggja á StÍF liðnum, eftir at hann hevur sitið uttanfyri við skaða seinastu dystirnar*